# Smálombini komin



LEMBING
*Jórunn Reginsdóttir*
*Fía Niclasen*
*Starvspraktikantar*

Nú er várið komið, og so smátt byrja smálombini at koma. Í Havn eru ikki nógv lomb at síggja enn, men á bygd eru fleiri at síggja.

Enn er heldur tíðliga hjá seyði at lemba, tí vanliga byrjar lembingartíðin ikki fyrr enn um mánaðarskiftið - apríl-mai.

Kortini sóðu vit eitt sera elskuligt smálamb Yviri við Strond í morgun. Hetta, óivað tí heimaseyður vanliga lembur áðrenn hagaseyður.

*Hendan myndin av nýlembdum smálambi er tikin yviri við Strond fyrrapartin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Løkke verri umtóktur

**Næstformaðurin í Vinstra, føroyskt gifti Lars Løkke Rasmussen, er ikki longur so upplagdur eftirmaður hjá Anders Fogh Rasmussen sum forsætisráðharri í Danmark**

POLITIKKUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Til fyri kortum hevur so at siga ongin dani sett spurnartekin við Lars Løkke Rasmussen sum eftirmann hjá Anders Fogh Rasmussen sum forsætisráðharra í Danmark. Soleiðis er ikki longur. Meiri enn annar hvør dani – ella ein meiriluti upp á 54,5 prosent – halda hann vera ógnaðan til starvið, meðan 31,6 meta hann vera egnaðan. Tølini koma fram í eini veljarakanning, sum Rambøll Management hevur gjørt fyri Jyllands-Posten í tíðarskeiðnum 7.-10. apríl.

Lars Løkke Rasmussen hevur í seinastuni verið fyri hørðum atfinningum frá serliga Sosialdemokratunum orsakað av óskili í pengaskjølum frá tíð hansara sum innaríkis- og heilsumálaráðharri. Sjálvur vil Lars Løkke Rasmussen, ið hevur føroyska konu, ikki gera viðmerkingar til kanningina.

Politiska framsøgukvinnan úr Vinstra, Inger Støjberg, heldur tað vera djúpt órættvíst, at smá mistøk og gloymska í ráharraskrivstovuni hjá Løkke kasta skugga á politisku úrslit hansara. Stjøberg heldur herferðina móti floksfelaga hennara vera eitt lágpunkt í donskum politikki.

»Tað er politisk smáligheit, tí í veruleikanum hava tað bert verið mistøk í fýra út av 1.000 skjølum,« sigur framsøgukvinnan hjá Vinstra við Politiken.



*Ein meiriluti av dønum halda ikki, at Lars Løkke Rasmussen er egnaður sum forsætisráðharri, um Anders Fogh Rasmussen skuldi lagt frá sær, sum tað hevur ljóðað í seinastuni.*